## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Seint um kvøldið frískar hann vindin lágt. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Sjey føroysk lesandi til San Diego í California

**Tann 26. august 2008 byrja sjey studentar á Søgu- og Samfelagsdeildini sum gestalesandi á California State University í San Diego. Har koma tey at verða alla lestrarhálvuna og koma ikki aftur til jólar.**



### ÚTBÚGVING

Á einum so stórum universiteti eru valmøguleikarnir at velja fak og skeið ómetaliga nógv størri enn á Fróðskaparsetrinum, ætlanin er fyrst og fremst at taka skeið sum snúgva seg um amerikonsk viðurskifti.

Fakligi leiðarin fyri stjórnmálafrøðisdeildini tekur sær av teimum og hjálpir teimum at finna seg rættis fakliga. Júst hesa lestrarhálvuna fáa tey eisini eitt sera gott høvi at eygleiða amerikanska valstríðið og tað orðaskiftið, sum fer fram millum studentar og universitetslærarar. Hetta er fyrstu ferð, at stjórnmálafrøði- og søgulesandi í felag hava tikið seg saman til saman at fara burtur í eina heila lestrarhálvu, tað hava teir gjørt gjøgnum ígjøgnum "The American Language Institute", ið virkar sum ein forlongdur armur hjá amerikonskum universitetum, sum hevur til uppgávu at fáa lesandi uttanífrá at koma til USA at lesa.

Veðurlagið er stak gott í San Diego, so umframt at lesa, fáa tey sjey føroysku lesandi eisini stundir til at liggja í strondini og sóla sær. Sí meira um universitetið á www.sdsu.edu

- Samstundis sum tað er politikkur setursins at fáa so nógvar studentar at lesa í Føroyum sum gjørligt, so er tað eisini sera týdningarmikið, at tey lesandi eisini fara út um landoddarnar í eitt longri tíðarskeið at lesa í einum fremmandum umhvørvi. Tað er júst í samanrenningini millum tað heimliga og tað fremmanda at tey lesandi fáa ein íblástur sum bæði kann koma teimum sjálvum og Fróðskaparsetrinum til góðar, sigur Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetrinum.

Tey lesandi fáa sjálvandi góðskrivað tey skeið og tey fak, sum tey taka við universitetið í San Diego.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 27 |
| Athen | -- |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 976 hPa. yviri á Vesturlandinum grynnist og lýggj luft rekur av útsynningi móti Føroyum.



**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland grynnist framvegis og brúgvaløgini vestan fyri Skotland fara eystureftir

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/08 kl. 06[00] – 25/08 06[00]. Hitin í gjár: 12,1°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 22,0 mm – mált frá 24/08 kl. 06[00] – 25/08 06[00].
Avfallið higartil í august: 119 mm




Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

24. august Seinna kvarter
26. august Mánin næstur jørðini
30. august Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. aug. | 3:20 | 15:49 | 2:20 | 14:49 | 2:35 | 15:04 | 5:20 | 17:49 | 6:20 | 18:49 | 1:35 | 14:04 | 0:35 | 13:04 | 3:35 | 16:04 | 4:35 | 17:04 | 3:05 | 15:34 | 4:20 | 16:49 |
| 27. aug. | 4:18 | 16:47 | 3:18 | 15:47 | 3:33 | 16:02 | 6:18 | 18:47 | 7:18 | 19:47 | 2:33 | 15:02 | 1:33 | 14:02 | 4:33 | 17:02 | 5:33 | 18:02 | 4:03 | 16:32 | 5:18 | 17:47 |
| 28. aug. | 5:14 | 17:42 | 4:14 | 16:42 | 4:29 | 16:57 | 7:14 | 19:42 | 8:14 | 20:42 | 3:29 | 15:57 | 2:29 | 14:57 | 5:29 | 17:57 | 6:29 | 18:57 | 4:59 | 17:27 | 6:14 | 18:42 |
| 29. aug. | 6:07 | 18:32 | 5:07 | 17:32 | 5:22 | 17:47 | 8:07 | 20:32 | 9:07 | 21:32 | 4:22 | 16:47 | 3:22 | 15:47 | 6:22 | 18:47 | 7:22 | 19:47 | 5:52 | 18:17 | 7:07 | 19:32 |
| 30. aug. | 6:55 | 19:18 | 5:55 | 18:18 | 6:10 | 18:33 | 8:55 | 21:18 | 9:55 | 22:18 | 5:10 | 17:33 | 4:10 | 16:33 | 7:10 | 19:33 | 8:10 | 20:33 | 6:40 | 19:03 | 7:55 | 20:18 |